# Sjúkrarøktarfrøðingur til Kommunulæknavaktina

**Vit søkja eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi á starvsbrøki 0,4 til setan 1. mars til og við 31. oktober 2011. Arbeiðstíðin er kvøldvaktir, gerandisdagar og dag- og kvøldvaktir í vikuskiftinum**

Sosialurin 341800

Vaktarskipan á Landssjúkrahúsinum fyri kommunulæknar virkar í tíðarskeiðinum frá kl. 16.00-08.00 allar dagar, umframt dagtímarnar í vikuskiftum og halgidøgum. Eingin sjúkrarøktarfrøðingur er í náttarvaktini. Tætt samstarv er við skaðastovu og bráðmóttøku.

Kommunulæknavaktin á Landssjúkrahúsinum umfatar miðstaðarøkið, tvs. Streymoy, Eysturoy, Vágoy, Sandoy, Nólsoy, Hestoy, Koltur, Dímun, Mykines og Suðuroy.

**Arbeiðsøkið í høvuðsheitum:**
Arbeiðsøkið umfatar móttøku, observatión og sjúkrarøkt til sjúklingar, ið seta seg í samband við kommunlæknavaktina, koma á skaðastovuna og í bráðfeingis móttøkuna, umframt at hjálpa kommunulæknanum við kanningum og viðgerð

**Vit kunnu bjóða:**
- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- gott og jaligt arbeiðsumhvørvi

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í móttøku, observatión, kanningum, viðgerð og røkt av sjúklingum við bráðfeingis tørvi
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- er opin og jalig/ur
- teldukunnleiki á brúkarastøði
- skal kunna arbeiða sjálvstøðugt

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jórun Højgaard, deildarleiðara á G1, tlf. 304500, lokal 5811 ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Bráð, tlf. 304500, lokal 5102.

**Umsóknarfreistin er:**
**mánadagin 31. januar 2011**
**kl. 12.00**



Trivnaður

Størv á Landssjúkrahúsinum



Sjúklingurin í miðdeplinum

www.ls.fo

Gransking & menning

# Sjúkrarøktar-frøðingar til B8

**Vit søkja tveir avloysarar fyri sjúkrarøktar-frøðingar á B8 á setanarbrøki 0,8 í skiftandi vaktum í tíðarskeiðinum 1. februar ella eftir avtalu til og við 31. august 2011**

B8 er ein kardiologisk deild við 10 seingjarplássum. Vit taka bæði ímóti akuttum og planløgdum sjúklingum. Vit samstarva m.a. við kardiologisku starvsstovuna og hjartarehabiliteringina. Okkara sjúkrarøkt er løgd til rættis eftir hugtakinum "primary-nursing".

**Krøv til umsøkjarar:**
- prógv og góðkenning sum
- sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av kardiologiskum sjúklingum
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, avbjóðandi og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- innleiðslu og upplæring

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava:**
- kardiologiskar royndir

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið

Nærri fæst at vita hjá Poulu Jacobsen, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 6068/ lspouja@ls.fo ella hjá Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingi, lokal 6102/ lsingga@ls.fo

**Umsóknarfreistin er:**
**31. januar 2011 kl. 12.00**

# Sjúkrarøktarfrøðingur til A2/Føðideildina

**Tvey størv sum avloysari fyri sjúkrarøktar-frøðing á starvsbrøki ávikavist 0,7 og 0,6 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan 1. mars 2011 til og við 29. februar 2012**

Føðideildin er ein samansett eind við fýra ymiskum sergreinum, ið umfata føðingar, barnakonur, barsil og neonatologi. Endamálið við deildini er at veita viðgerð og røkt til barnakonur og nýfødd børn. Hetta verður gjørt í tøttum tvørfakligum samstarvi millum fakbólkarnar, sum eru tilknýttir deildini og heilsuskipanini annars.

**Deildin er eitt spennandi og mennandi starvsstað við nógvum framtíðarav-bjóðingum. Tí søkja vit eftir sjúkra-røktarfrøðingi, sum hevur:**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og eitt opið og jaligt sinni
- hug til tvørfakligt samstarv
- ynski um mennandi avbjóðingar
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- kreativitet og fleksibilitet
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á deildini

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja 304500 til Heidi Bech Rasmussen, deildarleiðara á A2, lokal 5022 ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102.

**Umsóknarfreistin er: 27. januar 2011**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:*

***Landssjúkrahúsið***
***Lønar- og starvsfólkadeildin***
***FO-100 Tórshavn***